# Listaleypurin

2021—2022

# VÆLKOMIN TIL LISTALEYPIN

## SKÚLAÁRIÐ 2021–22

Listaleypurin er aftur á tremur við spennandi framførslum, dagsverkstovum og longri verkstovum. Fyri skúlaárið 2021/22 eru 15 tilboð á skránni.

Tilmeldingin fer fram á heimasíðuni www.listaleypurin.fo. Her finna tit tilfar um hvørja einstaka verkætlan, sum hevur sín egna bredda á heimasíðuni. Eisini finna tit tekningarskjalið á síðuni. Freistin at melda til er 15. septembur 2021.

Við bestu ynskjum um eitt gott skúlaár og eitt gott listaleypaár 2021—22.

**Rannvá Káradóttir**
Verkætlanarleiðari


| | |
|---|---|
| Soleiðis virkar Listaleypurin | 4 |
| Klingra | 6 |
| Jazzkrasj | 8 |
| HeartBeat | 10 |
| Tears of a Clown | 12 |
| Tað má røkka ella støkka | 14 |
| Skuggin | 16 |
| DO AS I SAY | 18 |
| Barna SWAY | 20 |
| Kópakonan í nýggjum hami | 22 |
| Teir 12 mánaðirnir | 24 |
| Fyrsta Cine-koncert mín | 26 |
| Tekning burtur frá strikuni | 28 |
| Oldschool | 30 |
| Animering | 32 |
| Hin 19. oyggin – har tíðin ikki finst | 34 |
| Krøv til luttakandi skúlar | 36 |
| Tilmelding | 38 |

# SOLEIÐIS VIRKAR LISTALEYPURIN

- Hvørt skúlaár verður ein faldari við listatilboðum sendur skúlunum í øllum luttakandi kommunum.

- Forskúlar og skúlar kunnu bíleggja listafólkavitjan við at fylla teldutøkt tekningarskjal á www.listaleypurin.fo

- Verkætlanarleiðarin samskipar skúlavitjanina í samráð við skúlar og listafólk. Listaleypurin roynir eftir førimuni at ganga øllum ynskjum á møti.

- Eftir vitjanina verður eftirmetingarskjal sent kontaktlæraranum, ið hevur ábyrgd av, at tað verður útfylt.



# VIT MÆLA TIL

- At næmingarnir eru við til at velja listavitjanir til skúlan. Hetta kann gerast við umboðum úr næmingaráðnum, ella við at flokkarnir stovna eitt listaráð og velja sær umboð at velja listavitjanir saman við lærarunum.

- At næmingaumboðini taka ímóti listafólkunum og vísa teimum runt á skúlanum saman við kontaktlæraranum.

- At lærarar gera listavitjanina til ein part av námsætlanini.

# KLINGRA — Ein tónleikaframførsla, sum ljóðar eitt sindur sum tú




FO/DK

Klingra bjóðar næminginum inn í ein estetiskan hugaheim, sum kann virka sum ein steðgur frá gerandis andsligari sundurpetting. Samstundis taka tey ljóð og myndir úr gerandisdegnum hjá næmingunum upp í framførsluna. Næmingarnir fáa nevniliga eina bundna uppgávu, sum tey loysa, áðrenn bólkurin kemur á vitjan. Til uppgávuna krevst ein snildtelefon. Næmingarnir taka til samans 6 myndir og 2 ljóðbrot. Hesar myndir og ljóð verða síðan flætta upp í konsertina á skúlanum.

**Listafólk**: Dánjal á Neystabø, Heðin Ziska Davidsen og Kim Rafael Nyberg
**Listagrein**: Tónleikur
**Slag**: Framførsla
**Longd**: Uml. 40 min
**Tíðarskeið**: 27. septembur–01. oktobur 2021
**Málbólkur**: 4.–7. flokkur, 8.–10. flokkur
**Næmingatal**: Vit samstarva við ein flokk (24 næmingar), áðrenn vit koma á skúlan, men øll eru vælkomin til konsertina á degnum
**Høli**: Høli við myrkalegging er fyrimunur
**Krøv**: Eina uppvørpu

27.09.2021 — 01.10.2021

# JAZZKRASJ

Jazztónleikur kann vera stuttligur ella syrgin, skjótur ella seinur, rútmiskur ella flótandi, fjákutur ella blíður – og øll kunnu finna tann jazztónleikin, sum teimum dámar best.

**Listafók:** Torleik Mortensen, Hjørtur Pætursson Háberg, Dánjal Á Neystabø
**Frásøgufólk:** Lasse Jæger
**Listagrein:** Tónleikur
**Slag:** Framførsla
**Longd:** 30–40 min.
**Tíðarskeið:** 18.–22. oktobur 2021
**Málbólkur:** 0.–3. flokkur, 4.–7. flokkur
**Næmingatal:** Í minsta lagi 20
**Høli:** Eingi krøv
**Krøv:** Helst eitt akustiskt klaver

FO



18.10.2021 — 22.10.2021

# HEARTBEAT



DK

Performancebólkurin HeartBeat Group eru tríggir bragdligir tónleikarar fullir av spæligleði. Teir bjóða eina fjølbroytta konsertuppliving, sum bralar av eldhuga. Framkomnar rytmur verða leikandi lætt bornar fram, meðan leikpallurin fyllist av sangi, rappi, sjónleiki og stomp.

Við hjartayli og einum skálkabrosi lýsir HeartBeat Group langt út um pallrøðina og bergtekur børnini, sum á leiðini verða boðin at vera við í sangi, klappan og bodybeat. Fyri hvørt eitt trummuslag – hvørt eitt hjartaslag – breiða brosini seg.

**Listafólk**: tríggir tónleikarar úr bólkinum HeartBeat Group
**Listagrein**: Stomp Musik
**Slag**: Sýning við verkstovu
**Longd**: Millum 45 og 50 minuttir
**Tíðarskeið**: 26.–29. oktobur 2021
**Mál**: Svenskt og enskt
**Málbólkur**: 0.–3. flokkur, 4.–7. flokkur
**Næmingatal**: 150 næmingar
**Høli**: Gólvvídd (við ongum gólvteppi) í málunum 6 metrar í dýpd og 6 metrar í breidd
**Krøv**: Vanligan streym

**26.10.2021** — **29.10.2021**

# TEARS OF A CLOWN



SV

Ein genta. Eitt parlag. Eitt óruddiligt rúm og ein soraður veruleiki. Ein leikframleiðsla grundað á rørslu um eitt niðurbrótandi parlag lýst úr sjónarhorninum hjá einum fívli. Hvør er fívilin, og hví sigur hann hesa søguna? Framførslan er bygd á samrøður og samtalur við eitt staðbundið kvinnuhús. Ætlanin er at varpa ljós á harðskap við hús í parlagi hjá ungum fólkum og at eggja næmingum til at verða kunnigar við evnið.

**Listafólk**: tríggir leikarar úr bólkinum DHMJ- Det Här är Mitt Jobb
**Listagrein**: Sjónleikur
**Slag**: Framførsla
**Longd**: 45 minuttir
**Tíðarskeið**: 01.–05. novembur 2021
**Málbólkur**: 8.–10. flokkur
**Næmingatal**: Í minsta lagi 15. Í mesta lagi 100.
**Høli**: Floksstova, aula ella fimleikahøll
**Krøv**: Einfalt ljós, sum lýsir á pallin og ger partar ”svartar”. Um neyðugt ber til við dagslýsi eisini
**Ljóð**: Ein hátalara

01.11.2021 — 05.11.2021

# TAÐ MÁ RØKKA ELLA STØKKA

NO

Ein akrobatisk sýning um kvinnuliga styrki. Við støði í egnum ættarsøgum kanna seks kvinnuligir parakrobatar markið millum at røkka og at støkka. Tyngd og lættleika. Styrki og viðkvæmi. Gleði og sorg.



**Listafólk**: Seks akrobatar úr bólkinum Circus By Me
**Listagrein**: Nýsirkus við fólkatónleiki
**Slag**: Sýning við verkstovu
**Longd**: 50 minuttir
**Tíðarskeið**: 10.–16. novembur 2021
**Málbólkur**: 4.–7. flokkur, 8.–10. flokkur
**Næmingatal**: Sýning í minsta lagi 30 næmingar, í mesta lagi 250 næmingar
**Høli**: 8x8 metrar pallstødd. 5 metrar loftshædd
**Krøv**: Minimum el-krav á 16A einfasað

**10.11.2021 —— 16.11.2021**

# SKUGGIN

DK



Ein audio/visuell konsertsýning enduryrkt eftir Hans Christian Andersen. Ein skuggi, sum yvirtekur lívið hjá harra sínum. Klarinettleikarin Fritz Gerhard Berthelsen ber fram ein monolog í tvífalda leiklutinum sum ein klókur maður og skuggi hansara, umgirdur av live-elektronikki og videomyndum á einum skíggja. Tónleikarin fær avbjóðing av einari farteldu við beats og loops. Ensemble Contemporánea hevur sett fokus á eitt týdningarmikið evni um samleika sagt frá gjøgnum samtíðarlist.

**Listafólk**: Fritz Gerhard Berthelsen
**Listagrein**: Tónleikur, Performance, Live Audio/video
**Slag**: Sýning
**Longd**: 40 minuttir
**Tíðarskeið:** 15.–19. novembur 2021
**Mál**: Danskt
**Málbólkur**: 0.-3. flokkur, 4.-7. flokkur
**Næmingatal**: Í mesta lagi 200
(best við 100–150 næmingum)
**Høli**: Fimleikasalur við 6 x 6 metra palløki,
eitt nú á gólvinum. Myrkalegging neyðug!
**Krøv**: Ein stikkkontakt, nakrir stólar og eitt lítið borð

15.11.2021 — 19.11.2021

# DO AS I SAY



DK/SV

DO AS I SAY er ein samvirkin dansisýning, sum lýsir sosialan atburð í spurningum um happing og autoritet. Áskoðararnir medvirka gjøgnum alla sýningina
, og bæði áskoðarar og dansarar fáa leiðbeiningar úr hátalarunum, men hvør er tað í roynd og veru, sum ræður? Endamálið er, at áskoðararnir skulu gerast tilvitaðir um, hvussu lætt vit verða ávirkað av einum bólki ella autoriteti.

**Listafólk**: 5 dansarar úr bólkinum Bobbi Lo Produktion
**Listagrein**: Dansur
**Slag**: Sýning við verkstovu
**Longd**: Sýningin varir 45 min. Verkstovan varir í uml. 15 min.
**Tíðarskeið**: 10.–14. januar 2022
**Mál**: Enskt
**Málbólkur**: 7.–10. flokkur
**Næmingatal**: Í minsta lagi 6 og í mesta lagi 30 næmingar
**Høli**: Í minsta lagi 12x12 metrar (til dømis ein fimleikahøll)
**Krøv**: Hátalarar og ljóðstyrkjari, sum kann bindast í teldu

**10.01.2022 —— 14.01.2022**

# BARNA SWAY

FO



Vit bjóða næmingum til eina interaktiva a capella jazzframførslu við SWAY, ið tekur børnini við inn í jazzin gjøgnum kend barnaløg. Vit læra tey ymisk jazz eyðkenni, á teirra støði, ígjøgnum sang, sjónleik og dans. Børnini sleppa at vera við í framførsluni við at syngja ymiskar harmoniseringar, sum til samans forma akkordir, samstundis sleppa tey at royna seg eitt sindur við vokalimprovisering o.ø.

**Listafólk**: Trio'in SWAY við Marionnu Winther Nagata, Daniu O. Tausen og Katrinu Olsen
**Listagrein**: Tónleikur, sjónleikur og dansur
**Slag**: Framførsla
**Longd**: 45 minuttir
**Tíðarskeið**: 10.–14. januar 2022
**Málbólkur**: 0.–3. flokkur
**Næmingatal**: í minsta lagi 10
**Høli**: Eingi serlig krøv
**Krøv**: Tað er best, um ljóðanlegg er tøkt, er hølið stórt

10.01.2022 —— 14.01.2022

# KÓPAKONAN Í NÝGGJUM HAMI



FO

"Kópakonan í nýggjum hami" er ein framførsla, ið sameinir tónleik, frásøgn og myndlist í eina hægri eind. Næmingarnir fara at uppliva søgnina um Kópakonuna á heilt nýggjan hátt — við tónleiki eftir Páll Sólstein, sum verður spælt av EKA trio, Biritu Poulsen sum sangara og frásøgufólki við myndum hjá Edwardi Fuglø.

**Listafólk**: Kristina Thede Johansen, Ernst Dánjalsson Remmel, Aksel Dánjalsson Remmel og Birita Poulsen
**Listagrein**: Tónleik, frásøgn og myndlist
**Slag**: Framførsla
**Longd**: 25 minuttir
**Tíðarskeið**: 10.–14. januar 2022
**Málbólkur**: 0.–3. flokkur, 4.–7. flokkur, 8.–10. flokkur
**Næmingatal**: Einki mark
**Høli**: Ikki ov lítið
**Krøv**: Eitt klaver. Uppvørpa. Mikrofon og hátalari



10.01.2022 — 14.01.2022

# TEIR 12 MÁNAÐIRNIR

FO



Í samstarvi við tónaskaldið Páll Sólstein framførir EKA yrkingarnar "Teir 12 mánaðirnir" hjá prestinum Lisbeth Smedegaard Andersen. Tónleikurin verður framførdur við klaveri, trompet, saksofon, sangi og slagverki. Teksturin er á føroyskum, og hvør einstakur mánaður hevur eina nýggja og øðrvísi ljóðførissamanseting, sum í sær sjálvum ger konsertina spennandi og hendingaríka.

**LIstafólk**: EKA tri við Kristina Thede Johansen, Ernst Dánjalsson Remmel, Aksel Dánjalsson Remmel
**Listagrein**: Tónleikur
**Slag**: Framførsla
**Longd**: Verða allir 12 mánaðir framførdir, er framførslan beint undir ein tíma
**Tíðarskeið**: 17.–21. januar 2022
**Málbólkur**: 4.–7. flokkur, 8.–10. flokkur
**Næmingatal**: 6–120
**Høli**: Rímiliga stórt høli
**Krøv**: Klaver og el

17.01.2022 —— 21.01.2022

# FYRSTA CINE-KONCERT MÍN



FR

'Fyrsta Cine-konsert mín' er ein stuttligur og skemtiligur háttur hjá teimum yngstu at fáa kunnleika um Rossini, Moussorgski, Beethoven, Stravinsky, Mendelssohn, Beethoven, Grieg, Bach, Delibes ella enntá Mozart. Tveir franskir tónleikarar, Clémence Gaudin við kontrabass og violin og Bruno Goddard við fagott og tvíhálsaðari ukulele, spæla og vitja av nýggjum klassiskar leikskráir úr 5 animeraðum stuttfilmum og fagna óvæntaðum tilburðum og muni.

**Listafólk**: tveir tónleikarar úr bólkinum Dulciné
**Listagrein**: Cine-Konsert tónleikur + biografur
**Slag**: Sýning við live tónleiki
**Longd**: Filmkonsertin varir 35 minuttir
**Tíðarskeið**: 14.–18. februar 2022
**Málbólkur**: Forskúli – 3. flokkur
**Næmingatal**: 20 til 100
**Krøv**: Uppvørpu

**14.02.2022** — **18.02.2022**

# TEKNING BURTUR FRÁ STRIKUNI





At læra at seta fokus og læra um perspektiv. Læra at síggja øðrvísi enn tað, mann sær “normalt” ígjøgnum eygað, og við tekningum læra, hvussu ljós og skuggar kunnu flyta tekningina til tað, sum vit síggja.

**Listafólk**: Frida Poulsen
**Listagrein**: Myndlistafatan
**Slag**: Verksmiðja
**Longd**: 3-4 skúlatímar
**Tíðarskeið**: 21.–27. februar 2022
**Málbólkur**: 0.–3. flokkur, 4.–7. flokkur, 8.–10. flokkur
**Næmingatal**: Í minsta lagi 2 og í mesta lagi 30
**Høli**: Vanlig skúlastova ella ítrivshøli
**Krøv**: Hvítt pappír og góðar blýantar

**21.02.2022 —— 27.02.2022**

# OLDSCHOOL
# — Ein bardagi ímóti aldurdóminum

NO



Oldschool er ein stórfingin og ómetaliga stuttlig breakdance-sýning um 3 gamlar menn, sum brádliga vakna á einum ellisheimi.

**Listafólk:** Tríggir dansarar úr dansibólkinum Absence
**Listagrein:** Dansur, sjónleikur, breakdance
**Slag:** Sýning
**Longd:** Sýningin varir í 45 min.
**Tíðarskeið:** 21.–25. mars 2022
**Málbólkur:** 0.–3. flokkur, 4.–7. flokkur, 8.–10. flokkur
**Næmingatal:** Vit hava einki mestatal, vit vilja hava so mong sum gjørligt
**Høli:** Hølini skulu kunna gerast heilt myrk, 5–7 m breidd, 5–7 m dýpd
**Krøv:** Okkum tørvar ljóðanlegg. Harumframt ynskja vit at læna eina sofu og tveir stólar til framførsluna

**21.03.2022** —— **25.03.2022**

# ANIMERING
# — stórar pappírsdukkur



NO

Verkstova 2. Dukkusjónleikur. Í hesari verkstovuni gera vit saman við næmingunum stórar dukkur/ marionettir úr pappíri. Dukkurnar eru livandi við einum slagi av bunraku stíli, har trý fólk mugu samstarva til tess at føra dukkuna. Samstarvið er bæði stuttligt og krevjandi og krevur tætt samstarv millum dukkuførararnir.

**Listafólk**: Karen Høie og Svein Gundersen
**Listagrein**: Dukkusjónleikur
**Slag**: Verkstova
**Longd**: 2 tímar
**Tíðarskeið**: 4.–8. apríl 2022
**Mál:** Norskt og enskt
**Málbólkur**: Forskúli – 3. flokkur, 4.–7. flokkur, 8.–10. flokkur
**Næmingatal**: í mesta lagi 20
**Høli:** vanlig floksstova
**Krøv**: Pláss at flyta seg við dukkunum

04.04.2022 —— 08.04.2022

# HIN 19. OYGGIN — har tíðin ikki finst



NL

Ímynda tær, at ein 19. oyggj er í Føroyum, og at á hesi oyggj er tíðin ikki til.

Hvussu hevði verið á eini tílíkari oyggj? Eldast fólk? Hvussu við degi og nátt? Tá ið fuglarnir koma? Flóð og fjøru? Í hesum multi-media listaverki bjóða vit næmingunum í felagsskapi saman við okkum at kanna, hvat tíð er, og hvussu hon kann upplivast. Vit fara bæði út í náttúruna og venda okkum inneftir fyri at skapa myndir, listarliga kortlegging, myndatøku, framførslur, yrkingar og ljóð/myndir.

**Listafólk**: Floortje Zonneveld og Eva Bullens
**Listagrein**: Multi- media
**Slag**: Myndlist og staðbundin mentanararvur
**Longd:** 4 dagar á hvørjum skúla
**Tíðarskeið:** 19.–20. mai 2022
**Mál**: Enskt
**Málbólkur**: 4.–10. flokkur
**Næmingatal**: Í mesta lagi um 30 næmingar
**Høli:** Floksstova ella gong

19.04.2022 —— 20.05.2022

# KRØV TIL LUTTAKANDI SKÚLAR

- At skúlin tekur væl ímóti listafólkunum og vísir teimum, hvar tey skulu vera.

- At skúlin sær til, at listafólkini fáa ta hjálp, teimum tørvar, so sum at bera inn, seta upp, taka niður o.a.

- At skúlin tryggjar sær, at hann lýkur krøvini til høli og tøkni fyri listavitjanina.

- At lærarin fyrireikar næmingarnar til listavitjanina soleiðis, at øll fáa sum mest burtur úr vitjanini.

- At lærarin hevur ábyrgd av næmingunum og er til staðar, meðan listavitjanin er.

Freistin fyri tilmelding er
**15. septembur 2021**

Eftir hetta verður skráin
løgd fyri árið.

Skúlarnir gjalda onki fyri vitjanina.
Norðurlandahúsið, Uttanríkis– og
Mentamálaráðið og kommunurnar
bera allan kostnaðin.

Listaleypurin fylgir leiðreglunum
hjá Korona ráðgevingini

Freistin fyri tilmelding er

15.septembur 2021

Tilmeldingin fer fram á

www.listaleypurin.fo

**Freistin fyri tilmelding er**

**15.septembur 2021**

Fá meira at vita á

**www.listaleypurin.fo**

Umsiting hjá Listaleypinum:

R.C. Effersøesgøta 26
FO-100 Tórshavn
tlf. +298 277 747
listaleypurin@listaleypurin.fo

UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ
Kommunufelagið
LISA
Norðurlandahúsið í Føroyum